LØGTINGIÐ

Til Landsstýrismálanevndina
her

Landsstýrismálanevndin

**25. august 2008**
**j. nr. 7.13-20080007[9] ja/td**
(at tilskila í svari)

**Viðgerð landsstýrismansins í almannamálum av sølu av sjúkrahúsbygningum (íbúðabygningum, løgujáttan)**

Á fundi í Landsstýrismálanevndini tann 3. juli 2008 hevur nevndin heitt á nevndarskrivaran um at gera nevndini eitt tilmæli sambært § 5, stk. 3 í starvsskipanini í sambandi við áheitan frá Kára á Rógvi, tingmanni, um, at nevndin tekur málið um sølu av sjúkrahúsbygningunum og vantandi viðlíkahaldi av bygningunum til viðgerðar.

Í áheitanini frá tingmanninum verður tikið fram, at landsstýrismaðurin hevur "borið seg undan at fremja málið" og hevur verið "langdrigin at meta um virði og seta bygningarnar til sølu". Herumframt metir tingmaðurin, at nevndin serliga eigur at taka saman um, hvat vantandi viðlíkahaldið hevur kostað.

***Málsgongdin í Landsstýrismálanevndini***

Við skrivi, dagfest 21. apríl 2008, hevur landsstýrismaðurin eftir áheitan sent Landsstýrismálanevndini eina frágreiðing um málsgongdina, frá tí málið byrjaði seint í 2002 og til 20. desember 2007. Í skrivinum vísir landsstýrismaðurin nevndini á upprit, dagfest 15. oktober 2007, og upplýsir, at hann væntar at fáa eitt endaligt tilmæli frá umsitingin um, hvat víðari skal henda í framtíðini viðvíkjandi bygningunum. Avrit av viðkomandi skjølum í málinum vóru viðløgd.

Við skrivi, dagfest 4. juni 2008, hevur landsstýrismaðurin í fíggjarmálum eftir áheitan sent Landsstýrismálanevndini ummæli av málinum, har hann sigur seg vera samdan í, *"at vantandi víðlíkahald í longri áramá, óivað verður meiri umfatandi og dýrari, tá so farið verður undir viðlíkahaldið."*

***Sølutilgongdin***

Sambært skjølunum í málinum varð avgerðin um at selja íbúðabygningarnar tikin á heystið 2003. Størsta partin av tíðini síðani tá – frá oktober 2003 og fram til september 2007 - hevur verið arbeitt við at avgreiða formlig viðurskifti, sum eru fortreyt fyri søluni. Serliga hevur tað tikið rúma tíð at broyta byggisamtyktina fyri økið, har bygningarnir standa, eins og samráðst hevur verið um aðrar treytir, so sum treytir fyri útsjónd á bygningunum frameftir og parkeringsviðurskifti. Eyðkennið fyri hesi viðurskifti er, at aðalráðið hevur lítla ávirkan á málsgongdina, tí tað eru Tórshavnar Kommuna, Byggi- og býarskipanarnevnd landsins og Innlendismálaráðið, sum eru byggimyndugleikar, og sum taka avgerðirnar hesum viðvíkjandi.

TINGHÚSVEGUR 1-3
POSTBOKS 208
100 TÓRSHAVN
TLF. 363900
FAX. 363901

Broytingin í byggisamtyktini er endaliga avgreidd í september 2007, og tíðliga í oktober 2007 læt aðalráðið inn umsókn um sundurbýting, sum er send Tórshavnar Kommunu til ummælis. Tað framgongur ikki av málinum, um kommunan hevur latið Matrikulstovuni hetta ummælið.

***Virðismeting av bygningunum***
Tingmaðurin vísir í síni áheitan til viðmerkingarnar hjá Landsgrannskoðanini í Frágreiðing um frávik millum játtan og nýtslu o.a. fyri fíggjarárið 2006 um vantandi virðismeting av bygningunum, har Landsgrannskoðanin viðmerkir, at tað hevði verið skilagott at gjørt eina dagførda virðismeting, sum kann gera seljaran føran fyri at meta um, hvørt tilboðini frá keyparum eru nøktandi, eins og virðismetingin kann vera ein stuðul í seinni samráðingum við keyparar. Somuleiðis verður víst til viðmerkingar landsgrannskoðarans um, at tað *"í sambandi við eina virðismeting av bygningunum, eisini kundi verið áhugavert at mett um, hvat vantandi viðlíkahald hevur kostað."*

Virðismetingin av bygningunum, sum ætlanin er at selja, er frá 2002, og uttanhýsis ráðgevin hjá aðalráðnum hevur í uppriti, dagfest 1. mars 2006, viðmerkt soleiðis: *"Áðrenn bygningarnir verða bjóðaðir út, eigur seljari at hava eina hóming av, hvat sølan kann gerast fyri, soleðis at tilboðini kunnu havnast, um tey verða mett at vera ov lág. Bygningarnir vóru í sínari tíð mettir av INNI. Hesir prísir verða dagførdir."* Í framhaldi av hesum verður í frágreiðing frá fundi millum ráðgevan og umboð fyri AHR 9. mars 2006 (dagfest 20. apríl 2006) mælt til, at eitt hámark/lágmark verður ásett.

Í frágreiðing frá fundi millum umboð fyri AHR og ráðgevararnar, dagfest 14. august 2007, verður viðmerkt, at tað er torført at gera eina nýggja virðismeting.

Omanfyri nevndu málsstig, saman við skjølunum í málinum, vísa, at sølutilgongdin hevur verið drúgv, men fyrst og fremst tí tað hevur tikið ymsum myndugleikum drúgva tíð at avgreiða formligu viðurskiftini, umframt at spurningurin um virðismeting/meting av innkomnum keypsboðum, eftir skjølunum at døma, verður mettur at verða aktuellur, áðrenn bygningarnir verða settir til sølu.

Við tilvísing til omanfyri standandi, og at einki í málinum gevur ábending um, at nakað brot skuldi verið framt á lóggávuna, verður, samsvarandi § 5, stk. 1, nr. 1 í starvsskipan nevndarinnar, mælt til, at nevndin ikki tekur málið til viðgerðar.

Jóhanna Arge
Nevndarskrivari

***§ 5 í starvsskipanini fyri Landsstýrismálanevndina er soljóðandi:***
**§ 5.** Nevndin tekur ikki mál til viðgerðar, tá ið
1) nevndin ikki metir, at rímilig grund er á fyriliggjandi grundarlagi at halda, at brot er framt á lóggávuna,
2) málið viðvíkur einum broti á lóggávu á málsøki, sum ikki er yvirtikið,
3) málið viðvíkur einum broti, sum ikki hvílir á almennum rættarligum grundarlagi, men á privatrættarligum grundarlagi,
4) málið longu er avgjørt í rættarmáli ella er av slíkum slagi, at nevndin heldur tað betur hóskar seg at gera av í einum rættarmáli,
5) nevndin á fyriliggjandi grundarlagi ikki metir, at ein nevndarviðgerð fer at geva eitt úrslit, sum stendur í mun til orkuna, nevndin skal seta av, fyri at kanna málið.
6) málið snýr seg um, at ein útreiðsla er hildin, sum ikki lógaheimild er fyri. Kærur um slík mál verða send løgtingsgrannskoðarunum til víðari viðgerð.

*Stk. 2.* Nevndin kann velja at vísa mál, sum hava við viðurskiftini hjá tí einstaka borgaranum at gera, til Løgtingsins umboðsmann.
*Stk. 3.* Skrivarin ger nevndini tilmæli sambært stk. 1 og 2.